## Fast starv á

# Føroya Barnaheimi

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Familjudeildina á Føroya Barnaheimi. Starvið ið er eitt fulltíðarstarv er leyst til setan frá 01.05.2007 ella skjótast til ber. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjudeildini.

**Um Familjudeildina:**

Á Familjudeildini eru 7 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðla í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv:**

Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til familjuarbeiði. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.

Ein partur av arbeiðinum er skrivligt arbeiði, og umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at málbera seg bæði í skrift og talu.

**Útbúgving:**

Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur útbúgving sum pedagogur, sosialráðgevi, sjúkrasystir, fysioterapeutur ella ergoterapeutur. Ynskiligt hevði verið, um viðkomandi somuleiðis hevur eina terapeutiska eftirútbúgving.

**Løn:**

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Um umsøkjari við aðrari útbúgving enn teim omanfyri nevndu fær starvið, verður viðkomandi løntur eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri hjálparfólk.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21.03.2007

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Brynhild M. Joensen deildarleiðara ella Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steingøta 10
100 Tórshavn

# SERNÁMSDEPILIN

## Avloysari fyri talilærara/audiologoped

Vegna farloyvi frá 15. mars 2007 til 15. juni 2007 sóknast vit eftir fólki hetta tíðarskeið at veita taluvenjing og at virka í talumennandi arbeiði, í mestan mun við børnum undir skúlaaldur.

**Førleikakrav**
Pedagogur ella lærari við serlæraraútbúgving – best við talu sum sergrein, audiologopedur, ið hevur royndir at arbeiða við smábørnum ella á annan hátt eftirútbúgvin pedagogur/lærari við áhuga í talumennandi arbeiði.

**Løn**
Eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag, lønarfl. 23 – 2 til 30 – 3.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. viðmælum eigur at vera Sernámsdeplinum í hendi tann 15. mars 2007.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali – hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 37 11 33 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

## Sjúkrarøktarfrøðingar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar á sjúklingadeildini í tíðarskeiðnum 1. juni til 30. septembur 2007.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til Sonny Ellendersen, deildarleiðara tlf. 37 11 33 lok. 110 ella fyristøðukvinnuna lokal 128.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
att. umsjónarmaðurin
Postsmoga 51
810 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

umsóknarfreist: 22. mars 2007.

# TOYOTA
## reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001 certificeret

DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi

Autoophuggernes DATALAGER DK



# Hús til Sølu

Matr. nr. 1002ag Undir Heygnum 32.

2x160 m². 4 stórar íbúðir og ein lítil.

Grundøkið 596 m²

Frítt og gott útsýni yvir Havnina, fjørðin, Argir og Sandágerði.

Stórt parkeringsøki inni á stykkinum.

Tann eina íbúðin í neðra hevur egna terassu.

**Tlf. 217300 • www.ognir.fo**

# Frá Sandoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur verður í Samljóð Skopun Leygarkvøldið 10. mars kl. 18.00

Kl.19.00 verður fundur undir heitinum »Flokkurin møtir veljarunum«. Við á fundunum verða ting- og landsstýrisumboð floksins.

Nýggir limir kunna tekna seg.

*Sandoyar Javnaðarfelag*

## A Ð A L F U N D U R

Felagið Vágar hevur aðalfund í Pakkhúsinum í Bø, **hóskvøldið 22. mars kl. 19.**

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***

## Bátur til sølu

Aquastar 33. Fult útgjørdur og klárur til fiskiskap.

**Tlf. 220763**